# Vælumtókt føroyakvøld

**Ferðavinnan í Eysturoynni er í ár farin undir at skipa fyri sokallaðum føroyakvøldum. Tvey hava longu verið, og verða tvey aftur um ikki so langa tíð í Kappróðrarneystinum á Glyvrum og á Hotel Eiði**

FERÐAVINNA
*Ingrid Bjarnastein*



*Føroyakvøld er eitt nýtt tiltak á skránni hjá ferðavinnuni í Eysturoynni. Borðreitt verður við nógvum fjølbroyttum og góðum føroyskum mati*

*Mynd: Eysturoyar Kunningarstova*

**Eysturoy:** Føroyakvøld er eitt nýtt tiltak á skránni hjá Ferðavinnuni í Eysturoynni. Tvey av hesum kvøldum eru longu farin afturum bak, men ætlanin er at skipa fyri fleiri hesum líkum kring alla oynna.

Kvøldini eru sera fjølbroytt við eini breiðum úrvali av undirhaldi. Hesi føroyakvøldini eru ætlað bæði ferðafólkum og føroyingum sjálvum, sum vilja uppliva eitt sindur av føroyskari mentan og mati.

Borðreitt verður við føroyskum mati, og eisini er høvi at síggja tann føroyska tjóðbúnan. Føroyskur dansur, filmur um Føroyar, upplestrar, felagssangur, kórsangur og mangt annað, eru bara brot burturúr fjølbroyttu skránni ferðavinnan í Eysturoynni kann bjóða teimum, ið hava hug til at vera við eitt tílíkt kvøld.

### Væleydnað

Tvey føroyakvøld hava longu verið, og vóru tey væleydnað, og gestirnir vóru ógvuliga væl nøgdir, frætta vit av Kunningarstovuni í Runavík.

– Tað er ymiskt staði til stað, hvussu nógvum fólkum pláss er fyri eitt slíkt kvøld, men tað svingar ímillum 50 til 150, sigur Rannvá á Kunningarstovuni í Runavík.

Tann 12. juli og tann 16. juli verða tvey føroyakvøld aftur á skránni, ávíkavist í Kappróðrarneystinum á Glyvrum og á Hotel Eiði.

Eisini ber til hjá luttakarunum at síggja føroyskt framleiddar vørur, og um hugurin er til tess, ber eisini til at ogna sær okkurt serføroyskt. Til dømis hava Snældan, Tøting og Eysturoyar Heimavirkið sýnt fram føroyskar vørur hesi kvøldini, og sum nakað heilt serligt, so skipa tey ymsu plássini eisini fyri, at fáa lokal fólk at selja og sýna fram okkurt, sum tey sjálvi hava virkað til.

Um hugurin nú skuldi verið til at sloppið á eitt tílíkt føroyakvøld er at seta seg í samband við eina av kunningarstovunum í Eysturoynni ella Sjómansheimið í Runavík.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og suðri og regn av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og eystri og mánadagin ælingur, men týsdagin regn ella mjørki. Hitin millum 9 og 13 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | 23 |
| Halifax | 18 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 13 |
| Tromsø | 17 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 29 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 29 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 35 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | |
| Buenos Aires | |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa í landnyrðing úr Føroyum grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1004 hPa. vestan fyri Írland fer í landsynning.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr íslandi stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/07 kl. 06⁰⁰– 04/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,9°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 9,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/07 kl. 06⁰⁰– 04/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 0,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

11. juli: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. juli | 03.32 | 15.51 | 02.32 | 14.51 | 02.47 | 15.06 | 05.32 | 17.51 | 06.32 | 18.51 | 01.47 | 14.06 | 00.47 | 13.06 | 03.47 | 16.06 | 04.47 | 17.06 | 03.17 | 15.36 | 04.32 | 16.51 |
| 6. juli | 04.10 | 16.30 | 03.10 | 15.30 | 03.25 | 15.45 | 06.10 | 18.30 | 07.10 | 19.30 | 02.25 | 14.45 | 01.25 | 13.45 | 04.25 | 16.45 | 05.25 | 17.45 | 03.55 | 16.15 | 05.10 | 17.30 |
| 7. juli | 04.51 | 17.13 | 03.51 | 16.13 | 04.06 | 16.28 | 06.51 | 19.13 | 07.51 | 20.13 | 03.06 | 15.28 | 02.06 | 14.28 | 05.06 | 17.28 | 06.06 | 18.28 | 04.36 | 16.58 | 05.51 | 18.13 |
| 8. juli | 05.37 | 18.02 | 04.37 | 17.02 | 04.52 | 17.17 | 07.37 | 20.02 | 08.37 | 21.02 | 03.52 | 16.17 | 02.52 | 15.17 | 05.52 | 18.17 | 06.52 | 19.17 | 05.22 | 17.47 | 06.37 | 19.02 |
| 9. juli | 06.27 | 18.53 | 05.27 | 17.53 | 05.42 | 18.08 | 08.27 | 20.53 | 09.27 | 21.53 | 04.42 | 17.08 | 03.42 | 16.08 | 06.42 | 19.08 | 07.42 | 20.08 | 06.12 | 18.38 | 07.27 | 19.53 |

5 707265 100050 >